Ítróttarblaðið





# Gunnar og Tranmere Rovers í eldin

Gunnar Nielsen og restin av Tranmere Rovers skulu leygardagin spæla sín fyrsta dyst í League One, sum triðbesta deildin í Onglandi. Fyrsti dysturin er á heimavølli ímóti Oldham Athletic, sum hevur fyrrverandi Manchester City leikarin, Paul Dickov, sum venjara.

**Gunnar Nielsen er útleigaður frá Manchester City til Tranmere fram til jólar.**



# Stevnumarran hjá KÍ heldur fram

**1. DEILDARFÓTBÓLTUR MENN** **Summarfestivalurin, Sjómannadagurin og Norðoyastevnan eru góðir dagar hjá klaksvíkingum flestum, bara ikki hjá besta mansliðnum hjá KÍ. Besta liðið hjá KÍ tapti aftur á Summarfestivalinum í ár**

Munurin millum bestu og næstbestu fótbóltsdeildina tykist at vaksa. Tað er aftur undirstrikað í hesi vikuni.

Tey trý fremstu í næstbestu deildini hava øll spælt í fyrrakvøldið ella í gjárkvøldið. Felags fyri tey øll var, at tey hittu næstbesta liðið hjá felag, sum eisini er umboðað í bestu deildini, og felags er eisini, at einki av teimum trimum bestu í næstbestu deildini megnaði at vinna á eykaliðunum hjá Vodafonefeløgum.

Í gjárkvøldið tapti 1. deildarliðið hjá KÍ greitt 2-4 ímóti eykaliðnum hjá Víkingi á heimavølli. Støðan í hálvleikinum var 0-3, og eitt skiftið var Víkingur á odda 4-0.

Sigast skal tó, at Finnur Justinussen var við á eykaliðnum hjá Víkingi, og hann gjørdi veruligan mun við tveimum málum í gjárkvøldið.

Í fyrra hálvleiki skoraði Víkingur trý mál uppá fimm minuttir. Dánjal Pauli Lervig legði Víking á odda, tá 27 minuttir vóru farnir av fyrra hálvleiki. Ein minutt seinni økti Kaj Leo í Bartalstovu til 2-0, og fýra minuttir seinni skoraði Finnur Justinussen til 3-0. Finnur Justinussen økti til 4-0, tá 12 minuttir vóru farnir av seinna hálvleiki.

Steffan Kalsø fekk tó bjargað eitt sindur av æruni hjá KÍ við tveimum málum í seinna hálvleiki, so tapið gjørdist 2-4. Sera javnt er millum KÍ, 07 Vestur og TB í oddinum.

Í Streymnesi var eykaliðið hjá EB/Streymi í hálvleikinum á odda 3-1 ímóti teimum bestu hjá 07 Vestur, sum í 2. hálvleiki svaraði aftur, so úrslitið gjørdist 3-3.

Í annaðkvøld skal EB/Streymur spæla steypafinalu í Klaksvík, og tí sigur tað seg sjálvt, at ongir av Vodafonespælarunum vóru við í kvøld.

Í gjárkvøldið tapti TB 2-1 í Gundadali ímóti teimum næstbestu hjá HB.

## ÚRSLIT

**4. august**
*HB-TB 2-1 (1-1)*
0-1: Rógvi Joensen 14.
1-1: Bárður Mortansson br 38.
2-1: Bárður Mortansson 48.

**5. august**
*EB/Str.-07 Vestur 3-3 (3-1)*
1-0: Arnar Dam 18.
2-0: Jens Michael Jensen 24.
2-1: Johan Ejvind Mouritsen 36.
3-1: Teitur Joensen 45.
3-2: Johan Ejvind Mouritsen 55.
3-3: Tór-Ingar Akselsen 81.

*KÍ-Víkingur 2-4 (0-3)*
0-1: Dánjal Pauli Lervig 28.
0-2: Kaj Leo í Bartalsstovu 29.
0-3: Finnur Justinussen 32.
0-4: Finnur Justinussen 57.
1-4: Steffan Kalsø 58.
2-4: Steffan Kalsø 73.

**7. august**
*AB-FC Hoyvík*

**8. august**
*HB-NSÍ*
*TB-B68*

**Støðan**

| | |
|---|---|
| *KÍ* | 31 |
| *07 Vestur* | 30 |
| *TB* | 29 |
| *Víkingur* | 25 |
| *HB* | 25 |
| *EB/Streymur* | 23 |
| *AB* | 19 |
| *NSÍ* | 18 |
| *FC Hoyvík* | 14 |
| *B68* | 2 |

*AB, NSÍ, FC Hoyvík og B68 hava spælt 15 dystir, og hini liðini hava spælt 16 dystir*



# ÍF-fjepparar stevna frá Fuglafirði

## ÍF-fjeppararnir eru klárir til steypafinaluna í annaðkvøld

Teir taka Sam til Klaksvíkar og fara annars at hita upp við Mentanarhúsið áðrenn. Gamla ferjan, sum í nógv ár sigldi um Leirvíksfjørð, førir fjeppararnar úr Fuglafirði til Klaksvíkar klokkan 13.45. Somuleiðis koyra bussar úr Fuglafirði til Klaksvíkar klokkan 16.00.

Og klokkan 16.00 byrjar upphitingin hjá ÍF við Flagspallin. Ein góðan tíma seinni, klokkan 17.15, verður farið á Injector Arena, sum fótbóltsvøllurin í Klaksvík verður róptur, og sjálvur dysturin byrjar klokkan 18.00. Í

EB/Streyma-fjepparar halda til í Club 700 í Klaksvík. Teir møtast klokkan 16.00 og hita so upp til dystin har.



# Tonni Kjær skal venja teilendskt landslið

Hondbóltsvenjarin Tonni Kjær skal venja eitt teilendskt hondbóltslandslið. Hetta skrivar heimasíðan hjá Neistanum.

Tonni Kjær skuldi annars hava ábyrgdina fleiri liðum hjá StÍF, men heimasíðan hjá Neistanum skrivar, at Tonni Kjær stutt fyri ólavsøku boðaði strandingum frá, at hann hevði tikið av venjaratilboði í Teilandi.

Sambært Andrasi Danielsen, formanni í StÍF, og sum neistin.fo hevur tosað við, er tað gjøgnum nakrar danskar kenningar, at avtalan millum Tonni Kjær og teilendska hondbóltssambandið er komin í lag.